



*Finn Hansen, sløkkiliðsleiðari er við hesa náttina. Hetta var samstundis hansara fyrsta stóra uppgáva, og hana greiddi hann til fulnar*



*Hann er í ferð við at tryggja sethúsini í Klaksvík. Eingin slingur var í valsinum, og arbeiðið var væl úr hondum greitt*



*Náttarinnar verk er lokið og menn sita og hugna sær saman – fremst v.m.: Dennis Hansen, Finn Hansen, Dánjal Poulsen og Jákup Joensen. Innast hm.: Jógvan Samson, Dan Hjelm, Ernst Vágsgarð og Ólavur Hansen*

# støðini

havnafútin, og við honum á støðini fall prátið heilt natúrliga inn á veður og ættir.

Nakað seinni helt ein teirra, at hesin skáin átti at nýtast til okkurt skilagott.

– Kom, latum okkum strekkja búkvøddarnar eina løtu. Hygg, dartið hongur á vegginum!

Jú, tað vóru menn sinnaðir til. Og soleiðis gekk spælið eina løtu.

**Aftur á sama stað**

Tá liðið er væl út um midnátt helt støðleiðarin fyri, at menn kundu bara fara til hús. Einki stórvegis var hent higartil í tí nógva vindinum, men menn skuldu bara vera klárir við tilkalling.

Sum sagt so gjørt. Menn fór til húsa um eitt-tíðina, men vóru ikki komnir meiri enn til húsa aftur, tá telefonin ringdi.

– Eg hevði júst sett lykilin í úthurðina, tá teir ringdu.

Her var bara eitt at gera: Avstað á støðina!, sigur ein teirra.

Boð vóru nevniliga komin enn einaferð úr Norðdepli. Fyrru ferðina var tað ein neystatekja. Hesa ferð ein presending á einum sethúsum frá seinasta stormi og sum var farin at leka aftur.

Fýra mans fóru beinanvegin avstað norður í Sund at tryggja hesa tekjuna. Meðan teir eru á tekjuni komu næstu boðini: Klædningurin á einum sethúsum í Klaksvík var um at loysna.

Neyðugt var at tryggja pláturnar, so tær ikki skuldu detta av og forvolda skaða á onnur hús. Hesa løtuna var ikki so nógvur vindur, men hinvegin so oysti regnið niður.

Enn einaferð eydnaðist tað monnum at tryggja seg ímóti at skaði kom á húsini.

**”Lukket og slukket”**

Klokkan er nú vorðin 02:45, og menn eru afturkomnir á støðina.

Fyri teimum á borðinum stendur nú nýgjørt kaffi og restirnar av flakadøgverðanum fyrr um kvøldið. Hetta kom sum vera man væl við hjá monnum.

Prátið gongur um tað sum teir hava arbeitt við í nátt. Lagið var gott á monnum og láturin rungaði í høll.

Tíbetur hendi ikki meiri hetta kvøldið, og kl. 03:15 fóru menn til húsa. Seinasti maður stongdi og sløkti á støðini.

Ein ódnarnátt var farin aftur um bak. Ein nátt, sum tíbetur ikki forvoldi teir stóru skaðarnar í Norðoyggjum.